# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Katrin Elisabeth**, dóttir Rigmor og Jens Mortan Rasmussen, Skáli, fer av Landssjúkrahúsinum hósdagin kl. 18, og jarðarferðin verður úr Neria á Skála fríggjadagin kl. 14. Tey ið vilja minnast Katrin Elisabeth kunnu lata eina gáva til Neria á Skála. Konta í peningastovnunum.

**Poul Jensen**, ættaður úr Vági, verður jarðaður úr Herlev kirkju, fríggjadagin 13. februar kl. 11.00.

**Agnes Sørensen**, kona Svein Sørensen í Rødovre, andaðist mánadagin 9. februrar, 84 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

# Groth Nolsøe 70 ár

Mikudagin 11. februar 2009 fylti dalbingurin Groth Nolsøe 70 ár.

Groth er sonur Demmus Nolsøe úr Dali, sum var uppvaksin á Trøðum á Sandi, og Onnu, fødd Johannesen, eisini úr Dali. Groth er giftur Fridu, ættað úr Elduvík og saman eiga tey fimm døtrar og átta abba- og ommubørn.

Groth var útlærdur timburmaður í 1960, og fekk hann dugnaskapsprógv fyri sveinastykki sítt. Groth hevur síðani arbeitt sum sjálvstøðugur og er enn sera virkin maður.

Sandoyarportalurin heilsaði Groth við hesum vøkru orðum:

»Fyri okkum sum koma aftaná er Groth ein varði á leiðini. Hegni hansara hevur gjørt at nógvir varðar standa eftir honum«.

*-red*



## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu tá ið okkara góði pápi, verfaðir, abbi, langabbi og bróðir

**Klæmint Nónklett**
Glyvrar

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk fyri hjálp í sambandi við jarðarferðina.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til tykkum, sum lótu gávu til Bátafelagið á Bakka.

*Fyri tey avvarðandi*
**Dinna og Pauli**

# Skúlaveitsla í Losjuni í 1964



Her er ein av myndunum frá realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin í sambandi við eina skúlaveitslu í Losjuni í 1964.

Tónleikararnir eru f.v.: Heri Kragesteen, Petur Ove Petersen, Óli Petersen og Frants M. Olsen, sum situr við trummurnar. Fremst á myndini er Ludvig Petersen, lærari, og Karl Johannes í Stórustovu.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 103)

*Myndaeigari: Anna Sofia í Brekkunum*

**Dagurin**
**12. februar. Eulalia**, deyð umleið ár 300. Ung genta í Barcelona í Spaniu, sum varð pínd og myrd fyri trúar sakir. Er verndarhalgimenni hjá býnum Barcelona. Navnið er grikst og merkir tann væltalandi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!



*Anders Berg frá MC-Søluni við skutaranum, sum drigið verður um leygardagin*

# Skutaratreff í Miðlahúsinum

Leygardagin 14. februar kl. 10 skipar MC-Sølan saman við Rás2 fyri skutaratreffi í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Talan verður um eina framsýning av ymiskum modellum av PGO og Piaggio skutarum.

Høvi verður til eitt prát við umboð fyri MC-Søluna um skutarar og motorsúkklur. Eisini verða onkur góð tilboð til tey vitjandi.

Vinningurin av sms-kappingini á Rás2 um ein PGO-skutara til eitt virði av umleið 15.000 krónum verður eisini drigin.

Rás2 ger tiltakið í samstarvi við Føroya Shell, MBM og MC-Søluna. Skutaratreffið verður frá kl. 10 til 14. Ókeypis Twix og PopTop verður at fáa.

*mg*